# Nýggi Smyril yvirtakast h











*– Tú boðar um ljósar tíðir.*
*Tú álit suðuroyingar ver.*
*Ein knørrur so snøggur og fríður,*
*Sum framburð til oynna ber.*

*Má Harrin signa verkið*
*Og føra teg trygt í Havn.*
*Tað verið tí stavnamerki*
*Og Smyril verður tít navn.*

*Soleiðis segði Anita Eidesgaard, kona løgman, tá hon doypti nýggja Smyril leygardagin*



**Hósdagurin 29. september verður dagurin tá ið føroyingar yvirtaka nýggja Smyril. Men tað fer at taka einar tvær, tríggjar vikur afturat at fáa hann í sigling**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nýggi Smyril verður yvirtikin hósdagin 29. september.

Tað er úrslitið av fundi ímillum Strandferðsluna og sponsku skipasmiðjuna nú umvikuskiftið.

Í sambandi við, at nýggi Smyril varð doyptur leygardagin, hevur eisini fundur verið ímillum sponsku skipasmiðjuna og Strandferðsluna um, nær Smyril skal yvirtakast.

Og partarnir eru samdir um, at hann skal verða klárur at yvirtaka hósdagin.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at enn er ymiskt at gera heilt liðugt, men tað eru smáting og Strandferðslan og skipasmiðjan eru samd um tað, sum skal gerast.

Teir næstu dagarnir skulu nú brúkast til at gera skipið liðugt í og til at gera endaliga sáttmálan lidnan.

Stjórin í Strandferðsluni sigur, at eftir at hann er leveraður, fer tað at taka eina lítla viku gera hann siglingarkláran og so tekur tað fýra dagar at sigla hann heim.

Men tá ið hann er heimkomin, fer tað aftur at taka nakrar dagar at gera hann kláran at sigla við ferðafólki, eitt nú skal manningin hava ymsar venjingar umborð í sambandi við trygdina.

So tað verður ikki fyrrenn í seinnu helvt í oktober, at hann verður settur í fasta sigling ímillum Suðuroynna og Havnina



*Í Spania og har um leiðir er siður at prestur vælsignar skipini, og soleiðis varð eisini gjørt leygardagin, tá nýggi Smyril varð doyptur leygardagin*

## Ein stórur dagur

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í samferðslumálum er avbera væl nøgdur við skipið.

Hann sigur, at talan er um eitt ómetaliga vakurt skip og umstøðurnar umborð eru sera góðar.

– Eg havi eisini fingið at vita frá skipakønum, at talan er um eitt dygdarhandverk, leggur hann afturat. Talan er um eitt skip við rættum cruisara-dygdum ov vit kunnu øll verða ómetaliga fegin um, at vit hava fingið eitt so stórt og gott skip at sigla á opnum havi við

Hann væntar eisini, at ferðafólkastreymurin ímillum Suðuroy og Havnina fer at veksa munandi.

Tað var Anita Eidesgaard, løgmansfrúa, sum doypti nýggja Smyril.